# ræðist fjølmiðlarnar

andi. Í 2004 verða útlendsku ítróttarfólkini nógv viðgjørd í fjølmiðlunum. Fólk eru í øðini inn á Innlendismálaráðið. Tingmenn ringja til løgmann, og løgmaður ringir til Jógvan við Keldu. Eisini floksformenninir eru ónøgdir. Tað endar við, at »lítla samgongan« kallar landsstýrismannin inn til fund.

- Teir kravdu, at útlendingarnir, sum eru í Føroyum, skuldu fáa loyvi at vera verandi, meðan tær nýggju umsóknirnar ikki skuldu takast við. Eg hevði rent meg í eitt fjall. Valið stóð ímillum at halda fast um linjuna ella at fylgja boðunum og bróta lógina. Eg valdi at koyra eftir lógini, sigur Jógvan við Keldu, sum sigur seg tá skilja, at ein bóltur var farin á rull, og at hetta helst fór at enda galið.

Sum tíðin líður, merkir hann eisini ávísa ónøgd millum sínar egnu floksfelagar.

- Eg kenni á teimum, at har er eitt ella annað. Tey siga einki, men eg síggi tað á andlitsbrøgdunum.

Tað er eisini um hetta mundið, at Jógvan við Keldu í Degi og Viku kemur við nøkrum orðavendingum, tá hann heldur tað vera løgið, at Rapa-hjúnini yvirhøvur eru sloppin inn á Læraraskúlan. Ein orðing, hann angrar.

- Eg visti longu sama kvøld, at eg hevði dummað meg. Eg hevði alment úttalað meg um eini privat hjún í einum máli, sum eg ikki sjálvur umsat. Tað var býtt, viðgongur tingmaðurin úr Klaksvík.

### Jørgen á vitjan

Vikuna áðrenn landsfundin hjá Fólkaflokkinum í oktober í fjør fær landsstýrismaðurin eina uppringing frá partamanninum Jørgeni Niclasen. Hann vil gjarna koma út og práta.

-Eg var ongantíð í iva um, hvat hann vildi mær, minnist Jógvan við Keldu.

Stutt eftir kemur Jørgen Niclasen framvið. Teir práta vinaliga um leyst og fast. At enda kemur bumban. Fólkaflokkurin vil styrkja yngra ættarliðið í Norðuroyggjum, og í hesum sambandi er ynskiligt at loyva einum øðrum at sleppa framat sessinum.

- Ætlanin hjá teimum var, at eg sjálvur skuldi leggja frá mær, nú eg í tvey ár hevði banað vegin. Eg segði, at eg ætlaði at sita hesi tvey árini afturat, men eg skuldi hugsa um hetta og venda aftur. Tveir dagar seinni ringdi Jørgen aftur fyri at vita, um eg hevði broytt hugsan. Eg segði, at eg ikki ætlaði at fara út við einari lygn uppá handan mátan og leggja meg skerflatan fyri løgmanni og fólkaflokkinum, greiðir hann frá.



*– Hann er ein veikur løgmaður. Hann vil helst hava frið. So skjótt ófriður liggur fyri framman, bakkar hann út, sigur Jógvan við Keldu um Jóannes Eidesgaard*

Mynd: Bárður Lydersen

Jørgen Niclasen vildi hava fund aftur fríggjadagin, so málið kundi avgreiðast áðrenn landsfundin, men landsstýrismaðurin var treiskur og bað hann bíða til mánadagin. Og tað var á hesum fundinum, at endaliga avgerðin varð tikin. Jógvan við Keldu varð koyrdur frá av løgmanni og sínum egnu.



*- Eg segði, at eg ikki ætlaði at fara út við einari lygn uppá handan mátan og leggja meg skerflatan fyri løgmanni og fólkaflokkinum, greiðir fyrrverandi landsstýrismaðurin við innlendismálum frá*

Mynd: Bárður Lydersen

### Veikur løgmaður

Í dag er Jógvan við Keldu avklártaður. Hann hevur lagt truplu tíðina aftur um seg. Stevið í flokkinum er gott, og samstarvið við floksfelagarnar og hinar tingmenninar er framúr, sigur hann. Men hann saknar framvegis eina reiðiliga grundgeving fyri, hví hann varð koyrdur frá.

- Grundgevingin helt jú ikki. Har kom eingin norðoyingur í sessin. Jacob Vestergaard varð settur ístaðin, sigur Jógvan við Keldu, sum kortini undirstrikar, at avloysarin úr Suðuroy hevur gjørt eitt gott arbeiði.

Men øðrvísi er metingin av Jóannes Eidesgaard.

- Hann er ein veikur løgmaður. Hann vil helst hava frið. So skjótt ófriður liggur fyri framman, bakkar hann út. Løgmaður hevur gott samband við fjølmiðlarnar, men hann ræðist teir, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin, sum leggur afturat, at hetta kann geva fjórða statsvaldinum størri vald, enn gott er.

Longu frá fyrsta degi var spenningur teirra millum. Stutt eftir, at landsstýrið varð mannað, varð Jógvan við Keldu kallaður oman til løgmann.

- Hann vildi hava meg at gera nakað, sum eg ikki vildi ganga við til. Eg vil ikki koma nærri inn á, hvat tað var, men eg segði nei. Komandi dagarnar bleiv hann við at trýsta meg. Eg gjørdi honum greitt, at um ikki eg slapp at ráða yvir mínum egna ráði, so gavst eg sum landsstýrismaður. Tá bakkaði hann. Taktiskt føldi eg hetta sum byrjanina til endan, sigur Jógvan við Keldu at enda.

Men Jógvan við Keldu angrar ikki, at hann tók av landstýrissessinum á sinni. Trupla tíðin hevur styrkt hann, og hann sigur seg ongantíð hava verið so væl fyri kropsliga og sálarliga. Hann fekk eisini eina ávísa uppreisn herfyri, tá hann varð afturvaldur sum annað umboð í Norðurlandaráðnum.

*Eitt plástur á sárið?*

- Nei, yvirhøvur ikki. Hetta var einki annað enn natúrligt. Har er jú einki sár, sigur Jógvan við Keldu, sum væntar, at hann stillar upp aftur til komandi val.